# Størri en




## Live-framførslurnar hjá Scorpions í Rio, Moskva og Berlin teljast helst millum størstu marknasteinarnar í alheims rocksøguni. Nú stendur Vágsbøur í Klaksvík fyri næsta skotinum frá týsku rock-legendunum

### Summarfestivalur



**Jákup Mørk**
jakup@sosialurin.fo

Hóast rockelegendur sum Ken Hensley og Roger Hodgson longu hava havt sínar framførslur á Vágsbøi. Og hóast metseljarar sum McFadden og Boney M eisini hava verið sama stað, so er eingin ivi um, at Summarfestivalurin í ár flytur eina deild upp.

Við Scorpions á plakatini kemur Klaksvík soleiðis ájavnt Moskva, Berlin og Rio, har heimskendi rockbólkurin hevur havt nakrar søguligar framførslur.

Moskva, tí bólkurin var eitt tað allar fyrsta vesturlendska orkestrið, sum spældi har, eftir at jarntjaldið fall.

Berlin, tí bólkurin við luttøku á The Wall konsertini hjá Roger Waters var við til at skriva politiska tónleikasøgu.

Rio, tí konsertin við hálvari millión áhoyrarum er millum størstu rock-konsertirnar í heimssøguni.

Og so sjálvandi Klaksvík, tí høvuðsstaðurin í Norðoyggjum uttan iva telist millum minstu plássini, sum bólkurin hevur vitjað tey seinastu 35 árini.

### Heimsnavn í triðings øld

Tí so leingi hevur bólkurin nevnliga verið millum teir stóru í rock-søguni. Ja, fyri tað millum teir allar størstu.

Spírin til tað, ið skuldi gerast mætasta rocknavnið í týskari tónleikasøgu byrjaði lítillátin í 1965, tá guitarleikarin Rudolf Schenker setti sær fyri at stovna ein beat bólk, sum tað vanliga varð nevnt tá í tíðini. Í 1969 kom yngri bróðurin Michael Schenker við í bólkin, og stutt eftir hetta játtaði vinmaðurin Klaus Meine at gerast forsangari. Navnið Scorpions varð tikið í nýtslu í 1971 – árið fyri at Lonesome Crow, frumútgávan hjá bólkinum varð givin út. Tá vóru fimm limir í Scorpions, sum bleiv endaliga mannaður av rútmusektiónini Lothar Heimberg (bass) og Wolfgang Dziony (trummur).

Á fyrstu konsertferðini hjá Scorpions var bólkurin upphitingarnavn hjá enska rockbólkinum UFO.

Næsta útgávan kom í 1974. Á Fly To The Rainbow setti fingrafimi Uli Roth sítt týðiliga eyðkenni á útgávuna, og so líðandi fekk bólkurin nú sín heilt egna samleika. Ein samleiki, ið eisini gjørdist sjónligari, tá samstarvið við tónleikaframleiðarain Dieter Dierks tók seg upp.

Roynt varð nú eisini at marknaðarføra bólkin uttan fyri europiska meginlandið, og hóast Uli Roth tók seg úr bólkinum, tá hann ikki var samdur í tónlistarligu kósini, so kom gjøgnumbrotið seinast í 70'unum.

### Gyltu 80'ini

Mathias Jabs hevði loyst Roth av sum guitarspælari, tá Lovedrive varð sent á marknaðin í 1979. Kendasta lagið frá hesi fløguni er uttan iva Holiday, og saman við heildini á fløguni annars lyfti hetta útgávuna upp til eitt pláss sum nummar 55 á Billboard. Og ikki bara oyruni fingu nakað. Húsin, sum bretski Storm Thorgerson hevði sniðgivið, varð kosin sum tann vakrasti á árinum, tá Playboy gav tónleikaárinum sítt ummæli.

Sosialurin